HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur 11. mai 2023 kl. 16.30 – 18.00

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila Í. Hentze, Gunnvør Balle, Leivur Simonsen, Jens á Skipagøtu og Malan á Dul Nielsen

Avboð: Kristianna W. Poulsen

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir

Skrivari: Malan á Dul Nielsen

Skrá:

1. Forkvinnan tekur saman um hetta árið

Í heyst skipaðu vit fyri einum tiltaki um rúsevni við Erling Fles, sum var væl eydnað og væl vitjað.
Ein tekning um kirkjutorgið er á veg, sigst. So er spurningurin um ”av og á setan” við kirkjuna er við ella ikki.
Vit hava havt ein fund við skúlastýrið við Løgmannabreyt og havt ein fund við næmingaráðið.
Àrið hevur ikki verið so hendingarríkt sum í fjør, tá talan er um projekt.
Skúlastýrið skal hava ein fund saman við lærarunum til ein námsfrøðiligan fund.
Vit hava umrøtt at hava foreldur og næmingar at møta til ein garðdag, og so er spurningurin eisini, hvat skal gerast til ein slíkan dag.
Fótbóltsvøllurin er umrøddur, tí hann er so illa farin.
Skulu vit hava eitt tiltak aftur í heyst, og hvat evni skulu vit hava til tað tiltakið?

2. Kunning frá leiðslu

Tímajáttanin er komin, og hon sær nøkulunda tað sama út, sum hon plagar.
Avgerð er tikin um at býta allar flokkarnar sundur frá 1. flokki
Klatristativið er liðugt og væl eydnað
Ein nýggj matpakkaskipan er komin. Tað er Mál, sum veitir hesa tænastuna eftir, at matpakkin.fo gavst. Krøv eru sett til veitaran um heilsugóðan mat og trygga levering.

3. Evt. nýtt um skúlaumbygging?
Heðin Mortensen, borgarstjóri var og vitjaði skúlan við allari sínari umsiting og Selmari Nielsen arkitekti, har lovað varð, at eitt skitsuprojekt til skúla skuldi fyriliggja áðrenn summarferiuna.

4. Mál - hvørji taka vit við okkum yvir í næsta árið.
Skúlastýrið arbeiðir við, hvat skal vera á skrá til felagsforeldrafundin í heyst. Dømi um evni:

Svøvnur, skúlaaftran

Garðdagurin hevur verið uppi at venda, men hvør skal, og hvussu skal hetta samskipast.

Skal ein garðdagur vera í mai komandi ár, og hvørjir lærarar skulu vera við?

Raðfesta fótbóltsvøllin, nú klatristativið er liðugt.

Gera okkurt fyri at vera sjónlig, tá ið skúlin letur upp aftur eftir summarfrítíðina.

Skúlabyggingin.

Hava fund fyrsta hósdag í hvørjum mánað og fáa innkalling til teir 6 fundirnir, sum eru.

5. Ymiskt

Skulu vit evt. gera eina trivnaðarkanning millum næmingarnar

Byrja næsta fund við at taka eina rundu runt um skúlan fyri at vita, hvat vit kunnu hampa um.

Næsti fundur verður 7. september

Fundurin lokin: 18:00